Ætla framvegis at halda freistina

-Strandfer›slan hevur kravt, at n‡ggja sandoyarferjan í øllum førum ver›ur li›ug 1. apríl

FER‹ASAMBAND
Áki Bertholdsen

Ta› fer ikki at nerva sandoyarferjuna stórvegis, at hon er seinka› so nógv úr Póllandi. Sostatt bendir nógv á, at tí›arætlanin fer at halda. Tvs, at ta› er tann seinasta tí›arætlanin, sum fer at halda, tí eftir teirri upprunaligu ætlanini skuldi hon longu veri› sett í sigling.

Men eftir, at hon bleiv eitt hálvt ár seinka› av polsku skipasmi›juni, sum gjørdi skrokkin, hevur 5. mars veri› nevndur sum dagurin, tá i› n‡ggja Sandoyarferjan skuldi setast í sigling.

Men sí›ani tá er hon blivin enn meiri seinka›. Eitt nú lá hon eina viku í Skagen, tí líkindi vóru ikki at sleipa hana til Føroyar. Nú um dagarnar kom skrokkurin so til Skála, har øll segl ver›a sett til fyri at gera hana lidna.

Men skipasmi›jan hevur bo›a› Strandfer›sluni frá, at av tí, at skrokkurin aftur er so nógv seinka›ur til Føroya, er skipasmi›jan noydd til at endursko›a byggiætlanina.

Ta› hendi á einum fundi mikudagin.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, sigur at aftaná fundin, fekk hann bo› frá skipasmi›juni um, at hon framvegis mi›jar eftir at halda freistina, so at ferjan kundi handast Strandfer›sluni 5. mars.

Men Skipasmi›jan tekur kortini ta› fyrivarni, at smávegis frávik kunnu ver›a gjørd, av tí, at skrokkurin kom so seint til Føroyar.

Stjórin sigur, at Strandfer›slan hevur svara› aftur, at hon gó›tekur, at sum umstø›urnar eru, ver›a smærri frávik í tí›arætlanini gó›tikin.

– Men vit hava kravt, at hon ver›ur li›ug í seinasta lagi 14 dagar á›renn hon ver›ur sett í sigling. Og setast í sigling, ta› skal hon 14. apríl, tí tá gongur undantaksloyvi hjá Tróndi út.

– Vit hava bo›a› frá, at vit vilja hava minst 14 dagar at venja okkum vi› skipi› og tí mugu vit hava ta› í seinasta lagi fyrst í apríl, sigur Reidar Nónfjall.

Ein kollvelting

Reidar Nónfjall sigur at n‡ggja sandoyarskipi› ver›ur ein kollvelting hjá sandoyingum, bæ›i hjá fer›afólki og hjá vinnulívi. N‡ggja Sandoyarferjan fer t.d. at taka tveir stórar treylarar og so einar 12 persónbilar afturat, ella tilsvarandi fleiri persónbilar, so ta› ver›ur helst søga, at ikki alt sleppur vi›. á Biladekkinum er gongubreyt, so at fer›afólk ikki koma í samband vi› bilar. Men yvirhøvur er Tróndur ikki ov lítil til fer›afólk, so n‡ggja ferjan fer at taka sama tal av fer›afólki, sum Tróndur, tvs. gott 200. Men umstø›urnar umbor› ver›a nogv betri.

N‡ggja Sandoyarferjan fer at sigla 11 míl og ta› er eitt líti› vet skjótari enn Tróndur.

Strandfer›sluni hevur kravt av Skipasmi›juni á Skála, at n‡ggja Sandoyarferjan er klár at seta í sigling í seinasta lagi 1. apríl

Eysturoyingar fáa onga skjóttgangandi ferju enn

Gamla Ternan stendur enn á sleipistø›i í Vági.Og sum ta› sær út í løtuni, ver›ur ta› framvegis hon, sum áliti› hjá eysturoyingum í eina tí› afturat

Teir høgu oljuprísirnir hava gjørt, at Strandfer›slan fyribils hevur lagt ætlanina á hyllina at leiga eina tvíkilju til skálafjar›arsiglingina

FER‹ASAMBAND
Áki Bertholdsen

Ta› ver›ur ikki enn, at eysturoyingar sleppa at sigla til Havnar vi› eini skjóttgangandi ferju. Strandfer›slan hevur leingi ætla› at leiga eina tvíkilju, ella eina a›ra, skjóttgangandi ferju, til Skálafjar›arsiglingina.

Ætlanin var at leita eina skjóttgangandi ferju í eina tí›, fyri at vita, hvussu ta› rigga›i inn á Skálafjør›in og møguliga at kn‡ta a›rar ruturupp í eisini.

Men fíggjarligu karmarnir hjá Strandfer›sluni eru so trongir, at enn hevur ta› ikki bori› til.

Ikki minst hava tær stóru príshækkingarnar á olju gjørt lívi› súrt hjá strandfer›slustjóranum. Oljuprísurin er meiri enn tvífalda›ur seinasta ári› og ta› hevur gjørt, at Strandfer›slan hevur veri› noydd at leggja ætlanina um eina skjóttgangandi ferju inn á Skálafjør›in á hyllina.

Herfyri fekk Strandfer›slan eina eykajáttan frá løgtinginum, sum m.a. anna› skuldi byrgja upp fyri príshækkingunum á olju.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, seg›i tá, at tá i› eykajáttanin var komin, var ætlanin at taka máli› um eina skjóttgangandi ferju inn á Skálafjør›in uppaftur.

Men nú sigur hann, at Strandfer›slan hevur framvegis so nógvar eykaútrei›slur av oljuni, at ta› ver›ur ikki fyribils, at fíggjarlig orka ver›ur til at útvega eina skjóttgangandi ferju til Skálafjør›in.

Hann vísir á, at Strandfer›slan hevur at kalla onki frælsi til at stúra fíggjarligu gongdini.

– A›rasta›ni ber ta› til hjá teimum, sum røkja fer›samband, at hækka fer›ase›laprísir og at lækka túratal fyri at útvega eyka inntøkur Men tann møguleikan hevur løgtingi› tiki› frá Strandfer›sluni.

Hann sigur kortini at spurningurin um eina skjóttgangandi ferju er ikki sleptur enn og hann ver›ur møguliga tikin uppaftur næsta ár.

Annars er ongin sigling inn á Skálafjør›in í løtuni. Gamla. Ternan er á sleipistø›i í Vági og hon ver›ur ikki tøk aftur, fyrrenn um mána›arskifti›. Inntil tá, er ta› Snarbussurin, sum røkir fer›asambandi› inn á Skálafjør›in.

Landsst‡ri› forsømt at fáa vi›urskiftini í rættlag

Hóast ta› í 1997 var greitt, at n‡ggj kunnger› mátti gerast fyri sernámsfrø›isliga virksemi›, eftir at Sernámsdepilin var› settur á stovn, er eingin kunnger› komin enn

SERNÁMSDEPILIN
Ey›un Klakstein

Tá Sernámsdepilin fór at virka frá árbyrjan í 1998 var greitt, at ney›ugt var vi› eini n‡ggjari kunnger› og at grei›a mátti á starvs- og setanarvi›urskiftunum á n‡ggja stovninum.

Men hóast politiski myndugleikin hevur havt tr‡ ár um at fáa hesi vi›urskifti í rættlag, er einki komi› upp á pláss av hesum, og ta› er millum anna› av hesi orsøk, at løgfrø›ingar ivast í løgfrø›isliga grundarlagnum undir stovninum.

Sí›ani 1997 hava f‡ra mans siti› í landsst‡rissessinum í undirvísingarmálum, og tann n‡ggjasti av teimum, Torbjørn Jacobsen, fer nú at seta eina kanning í verk av vi›urskiftunum á Sernámsdeplinum.

Ætlanin er, at hendan kanning skal sta›festa, hvat ta› er, sum er fari› fram, sí›ani Sernámsdepilin var› settur á stovn og fram til dagin í dag.

Kunnger› ney›ug

Í 1997 fór umsitingin hjá landsst‡rinum undir arbei›i› at leggja Skúlan á Trø›ni og Sernámsfrø›isligu Rá›gevingina saman til ta›, sum var› rópt eina fyrisitingarliga, námsfrø›isliga og fíggjarliga eind.

Landsskúlastjórin, Hensar Ellingsgaard, gjørdi eitt uppritt til landsst‡rismannin, Eilif Samuelsen, um samanleggingina, og sí›ani fekk John Rajani – sum nú er løgmansskrivari – til uppgávu at gera eitt uppritt um, hvussu samanleggingin kundi gjøgnumførast.

Í oktober mána›i var arbei›i› hjá John Rajani li›ugt, og ta› var lati› landsst‡rismanninum.

Í hesum uppriti ver›ur sta›fest, at ney›ugt var vi› n‡ggjari kunnger›, tá Sernámsdepilin skuldi fara at virka.

– Mett ver›ur framvegis, at ta› ikki er ney›ugt ella rætt at gera serstaka lóg fyri sernámsfrø›isliga virksemi, men n‡ggj kunnger› má gerast. Uppskot um n‡ggja kunnger› eigur at ver›a gjørd skjótast gjørligt, helst í summar, skrivar John Rajani í uppritinum.

Fyrr í ár var› ein n‡ggj kunnger› umsí›ir gjørd, men hon er ongantí› sett í gildi, og Bjørn á Heygum, løgfrø›ingur, sigur í eini meting um skúlan, at ta› vantar fullkomiliga lógarheimild fyri at innskriva og undirvísa næmingum á einum sonevndum Sernámsdepli.

Starvsvi›urskiftini upp á pláss

Uppriti› um Sernámsdeplin frá oktober í 1997 vi›ger eisini setanarvi›urskiftini hjá starvsfólkunum á n‡ggja Sernámsdeplinum.

Uppriti› ger greitt, at samanleggingin av Skúlanum á Trø›ni og Sernámsfrø›isligu Rá›gevingina setir nógvar spurningar um setanarvi›urskiftini.

– Fyri at fáa grei›i á øllum vi›urskiftum ver›ur helst ney›ugt at taka starvsfólkavi›urskiftini hjá øllum starvsfólkunum í Sernámsdeplinum til vi›ger›ar, skrivar John Rajani í uppritinum.

Hann sigur, at uppskot má gerast fyri, hvørji størv skulu vera, starvsl‡sing eigur at ver›a gjørd fyri hvørt einstakt starv, uppskot má gerast um starvstreytirnar, og samrá›ingar mugu takast upp vi› fakfeløgini hjá ymsu starvsbólkunum.

Men hóast hesa sta›festing í uppritinum frá 1997, eru starvsvi›urskiftini á Sernámsdeplinum framvegis ógrei›, og millum anna› ivast løgfrø›ingar í heimildunum at gjalda løn til nógv av starvsfólkunum.

Í sí›stu viku fingu ógrei›u vi›urskiftini og umrø›an av hesum lei›sluna á Sernámsdeplinum at siga seg úr starvi.

Hóast politiski myndugleikin hevur havt tr‡ ár um at fáa løgfrø›isligu vi›urskiftini á Sernámsdeplinum í rættlag, er vi›urskiftini framvegis ógrei›.

Mynd: Jens Kr. Vang

Tjaldri› eftir Brimli

Um ikki Fíggjarmálast‡ri› og feløgini finna eina semju, er hugsandi, at Tjaldri› ver›ur sent til Noregs at sleipa n‡ggja vaktarskipi›, Brimil, sum hevur ligi› í Noreg í tríggjar vikur, heim

VAKTARSKIPI‹ BRIMIL
Ólavur í Beiti

– Ein møguleiki er at senda Tjaldri› til Noregs eftir Brimli, um eingin loysn ver›ur funnin naka› skjótt, sigur Elmar Højgaard, stjóri á Vaktartænastuni.

Ta› er Fiskimálast‡ri›, sum stendur sum skrásettur eigari av n‡ggja vaktarskipinum, men ta› er Vaktartænastan, sum er rei›ari, og tí var hesin spurningur settur stjóranum á Vaktartænastuni.

Og Elmar Højgaard tekur undir vi›, at Brimil má fáast sum skjótast til loysa frá bryggju og setast í ta tænastu, sum vaktarskipi› er ætla›.

Norsk blø› skriva

Og til sama spurning sigur Jørgen Niclasen, fiskimálará›harri, at ta› er sjálvandi hansara ætlan at fáa vaktarskipi› hendavegin og so skjótt, sum gjørligt. Sambært Jørgen Niclasen eru fleiri møguleikar at fáa Brimil til Føroya, men hann vil ikki koma nærri inn á, hvussu hetta skal gerast. Ta› allarbesta er sjálvandi, at Fíggjarmálast‡ri› og feløgini koma til eina semju, so skipi› fær siglt sjálvt heim, metir fiskimálará›harrin.

Ta› seinasta n‡ggja er, at nú eru norsk blø› farin at skriva um Brimil, og m.a. ver›ur sagt í onkrum bla›, at stø›an er ikki verri enn so, at manningin umbor› hevur okkurt til matna enn. Men tó at endaligt stø›a ikki enn er tikin um, at fiskimálará›harrin gevur Vaktartænastuni bo› um at fara eftir n‡ggja vaktarskipinum, so er hetta ein møguleiki sum hevur veri› nevndur nakrar fer›ir.

Ein annar fyrimunur vi› at fáa Brimil heim til Føroya er, at vaktarskipi› rindar ikki bryggjupengar í Føroyum – eins og ta› ger í Noreg.

Ikki partískur

LØGTINSINS UMBO‹SMA‹UR
Ey›un Klakstein

Í bla›num í gjár høvdu vit samrø›u vi› Ingeborg Vinther, formann í Føroya Arbei›arafelag, um vali› av Jógvani Andreasen sum Løgtingsins Umbo›smann.

Í greinini sigur Ingeborg Vinther, at hon metir ikki Jógvan Andreasen vera rætta vali› til hetta starv. Hon heldur tó ikki, at hann hevur veri› partískur mótvegis fakfelagsrørsluni, sum ta› annars kom fram í greinini.